## Skulu tosa svenskt

Fólkafloksmaðurin Jógvan við Keldu heldur, at allir norðurlendingar eiga at duga at tosa svenskt. Við Aftonbladet sigur hann, at svenskt er tað størsta málið í Norðurlondum, og tí er tað ikki annað enn rímiligt, at svenskt verður eitt felags norðurlendskt mál. Jógvan við Keldu heldur, at á tann hátt kunnu vit forða tí enska málinum at doyva tey norðurlendsku. Nú bíðar hann eftir, hvat hini Norðurlondini siga.

## Dýr ferð

Tann 21. november fer nýggja skipið „Fram" hjá norska reiðarínum Hurtigruten av bakkastokki. Skipið skal ikki sigla í Noregi, men er serbygt til at sigla í tí arktiska økinum. Reiðaríið hevur gjørt av, at skipið skal fara sína fyrstu ferð úr Reykjavík til Eysturgrønlands í mai næsta ár, og sambært reiðarínum gongur tað væl at selja ferðaseðlar til tann fyrsta túrin. Men tað er ein dýr ferð, tí hon kostar 21.400 krónur.

# Ellis-og røktarheimið í Vági verður 33% dýrari

**Upprunaliga varð mett, at ellis-og røktarheimið, sum skal byggjast í Vági, skuldi kosta 1,2 fyri hvørt búfólk, men nýggjastu metingarnar vísa, at prísurin verður 1,6 millión**

ELLIS- OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ellis- og røktarheimið, sum ætlanin er at byggja í Vági, verður væl dýrari enn upprunaliga mett.

Tað vísir ein nýggj meting.

Upprunaliga varð mett, at heimið fór at kosta 1,2 millión fyri hvørt búfólk. Men nýggjastu metingarnar hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, vísa, at heimið fer at kosta góðar 1,5 millión fyri hvørt búfólk.

Tilsamans er ætlanin at byggja eitt heim til 24 fólk. So ístaðin fyri at kosta 28,8 milliónir, sum upprunaliga ætlað, verður nú mett, at tað fer at kosta 38,5 tilsamans.

Men hetta merkir so aftur tað, at parturin hjá kommununum verður væl størri enn ætlað.

Stuðulin frá landinum er 500.000 krónur fyri hvørt búfólkið og sostatt verður hann 12 milliónir í alt.

Men ístaðin fyri, at kommunurnar í Suðroy eftir ætlan skuldu betala 16,8 milliónir til byggingina, koma tær nú at betala 10 milliónir meir, ella 26,5 milliónir tilsamans.

Hesa upphæddina upp á 26,5 milliónir, kunnu kommunurnar fíggja við einum 10 ára láni, sum er rentufrítt og har tær ikki byrja at betala avdráttir, fyrrenn heimið er liðugt, ætlandi í 2009.

Landsstýrið hevur nú lagt uppskot fyri Løgtingið um at fáa heimild at læna kommununum peningin.

Støðan í Suðuroy hevur verið serliga vánalig og tí er politiskur vilji til at gera eina serliga skipan fyri Suðuroy, so at tað ber til at byggja heimið. Og tann serliga skipanin er at veita kommununum eitt rentufrítt lán til endamálið og har tey ikki byrja at betala avdráttir, fyrrenn heimið er liðugt og kommunurnar eru farnar at fáa kommunuskatt av tí arbeiði, sum heimið kastar av sær.

### Væntar at tað verður bíligari

Tað eru tær fýra kommunurnar í Suðuroyar syðru helvt, Sumba, Vágur, Porkeri og Hov, sum eru saman um at byggja heimið, tí tær tríggjar kommunurnar í norðaru helvt í oynni, Tvøroyri, Hvalba og Fámjin eru framvegis ikki sinnaðar at vera við.

Men enn er ikki ov seint hjá teimum at skifta meining, skuldi áhugi verið fyri tí.

Annars er tað landið, sum einsamalt hevur rakstrarútreiðslurnar av heiminum og tær verða mettar til 12 milliónir um árið.

Hans Pauli Strøm sigur, at upphæddin er sett sum eitt avgjørt hægstamark fyri, hvat tað fer at kosta.

Tað merkir, at hann metir, at heimið fer at vera bíligari enn tølini, sum her eru sett upp.

Hann sigur, at tá ið farið verður undir bygginginа, fara kommunurnar sjálvandi at stremba eftir at fáa byggikostnaðin so langt niður sum gjørligt fyri at sleppa bíligari.

| Kommuna | Skuld 2005 (mió. kr.) | Skuld afturat til ellisheim (mió. kr.) | Skuld íalt (mió. kr.) | Álíkning |
|---|---|---|---|---|
| Vágs | 56,5 | 16,5 | 73,0 | 2,0 |
| Sumbiar | 4,5 | 4,5 | 9,0 | 0,8 |
| Porkeris | 7,2 | 4,0 | 11,2 | 0,9 |
| Hovs | 3,1 | 1,5 | 4,6 | 1,6 |

*Taka tær fýra kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy av tilboðnum um lán til ellis-og Røktarheim í Vági, fer tað at ávirka lánibyrðuna hjá teimum soleiðis, sum talvan vísir. Men her er ikki lagt upp fyri teirri positivu ávirkan, sum ellirheimið fer at fáa við teimum arbeiðsplássum, sum har verða*

| Kommuna | Fólkatal | Avdráttir tilsamans | Avdráttir um árið |
|---|---|---|---|
| Hov | 127 | 1.491.139 | 149.114 |
| Porkeri | 344 | 4.038.990 | 403.899 |
| Vágur | 1.405 | 16.496.455 | 1.649.646 |
| Sumba | 381 | 4.473.416 | 447.342 |
| Syðra helvt tils. | 2.257 | 26.500.000 | 2.650.000 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv kommunurnar koma at betala um árið í avdráttum og, hvussu nógv, tær koma at betala tilsamans*

# Kemur ikki óvart á borgarstjóran í Vági

**Borgarstjórin í Vági heldur framvegis, at tað er neyðugt at byggja ellis- og røktarheim í Vági, hóast tað verður dýrari enn ætlað**

ELLIS-OG RØKTARHEIM Í VÁGI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Gongdin í syðru helvt í Suðuroy er bara ein veg og hon er, at fólkatalið minkar alsamt. Tí er alneyðugt at seta tiltøk í verk, sum skapa arbeiði, hóast hetta tíverri førir við sær, at kommunuskuldin hækkar, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági*

Borgarstjórin í Vági heldur framvegis, at tað einasta rætta er at halda fram við ætlanini at byggja ellis-og røktarheim í Vági.

Tað metir Kirstin Strøm Bech, hóast vit í greinini omanfyri kunnu vísa á, at prísgongdin í samfelagnum fer, at heimið verður dýrari enn upprunaliga mett.

Borgarstjórin í Vági vísir á, at tað, sum kommunan nú skal gjalda, er ikki so nógv meiri enn tað, sum upprunaliga varð mett at hon skuldi betala, tá ið ætlanim kom fram á sinni.

Munurin er bara tann, at upprunaliga varð ætlað at byggja eitt ellis- og røktarheim til 32 fólk.

Men tað, sum nú liggur á borðinum, er at byggja eitt heim til 24 fólk, sum kommunurnar og landið skulu fíggja í felag. Men príshækkingar gera, at nú verður so mett, at tað fer at kostar lítið minni enn eitt heim til 32 fólk upprunaliga varð mett at kosta.

Men so hevur landsstýrið harafturat eisini gjørt av at byggja ein økisdepil til sinnisveik til átta fólk, beint við ellis og røktarheimið, so tilsamans verða 32 búpláss í samlaðu byggiætlanini.

Fyrr hevur verið upplýst, at kommunurnar í Suðuroy skuldu sjálvar fíggja 22 milliónir til eitt ellis-og røktarheim í Vági, men nú verður talan sostatt um 26,5 milliónir.

### Felagsútreiðslur gera tað bíligari

Hetta er ein landsstovnur burturav, har landið betalir alla bygging og allan rakstur.

Men hóast hann liggur upp at ellis- og røktarheiminum, verður talan um tveir púra atskildar stovnar.

Og spurningurin er, hvørjar felags hentleikar ellis- og røktarheimið og depilin fyri sinnisveik koma at fáa og, hvussu útreiðslurnar til teir skulu býtast ímillum báðar stovnarnar.

Talan kann verða um felags køk, felags hitaskipan, felags vasking, felags fysio-og ergoterapi, felags koyriveg og parkeringspláss o.s.fr.

– Men allar hesar felags útreiðslurnar fara uttan iva at merkja, at prísurin fyri ellis-og røktarheimið fer at lække nakað, sigur Kirstin Strøm Bech.

Hon sigur, at samráðingar skulu nú verða við Landsstýrið um málið.

– Hendan príshækkingin er fyri so vítt ikki serliga kollveltandi, tó at tað upp á seg er bíligari at byggja ellis-og røktarheim til 32 fólk.

– Men gongdin í syðru helvt í Suðuroy er bara ein og hon er, at fólkatalið minkar alsamt. Tí er alneyðugt at gera okkurt munagott fyri at venda gongdini og tað má gerast skjótt. Og í hesum sambandi haldi eg, at tað hevur stóran týdning at skapa støðug og trygg arbeiðspláss og eitt ellis-og røktarheim við einum depili til sinnisveik afturat, fer kanska at skapa eini 50 arbeiðspláss og tað eigur at vera ógvuliga positivt fyri eitt øki sum okkara.

– So gerst ikki við, at hetta tíverri førir við sær, at kommunuskuldin veksur upp í tvær álíkningar, sigur borgarstjórin í Vági.